gult18 cyan18 magenta18 svart18

VIÐMERKINGAR

Enn eitt rokniark…

Kristina Háfoss
búskaparfrøðingur

…varð lagt fram fyri føroyingum í undanfarnu viku. Hesuferð var tað Javnaðarflokkurin, ið hevði latið hetta gjørt, og eins og undanfarnu ferð, tá ið politiskur flokkur kom við búskaparligum útrokningum, vísti úrslitið av rokniarkinum seg at tala júst fyri ætlanini hjá flokkinum, ið hevði latið rokniarkið gjørt.

Trý ymisk rokniørk

Seinastu vikurnar hava trý ymisk rokniørk verið at sæð í føroysku fjølmiðlunum. Landsstýrið hevur latið eitt gjørt og Sambands- og Javnarflokkurin hvør sítt. Øll eru tey ymisk og koma til ymiskar niðurstøður. Spurningurin er – hvat kunnu føroyingar nýta hesar útrokningar til ?

Nýtsla ella misnýtsla ?

Rokniørk kunnu verða frálík til at rokna búskaparlig framtíðarárin av ymiskum átøkum í samfelagnum, men greitt er, at tílíkar útrokningar hava nógvar feilkeldur og kunnu tískil bert nýtast sum vegleiðandi.

Úrslitið av búskaparligum útrokningum er heft at teimum fyritreytum, ið gjørdar verða. Hesar fyritreytir eitt nú búskaparvøkstur, útflutningur, fiskaprísir v.m. eru – serstakliga fyri eitt lítið samfelag sum tað føroyska - í stóran mun heftar at hvat fyriferst á altjóða leikpallinum, fyritreytir, sum vit ikki hava stórvegis ávirkan á.

Hetta ber í sær, at metingar skulu gerast um hesar óvissu fyritreytir. Á henda hátt kunnu búskaparligar útrokningar snikkast júst soleiðis sum ein ynskir. Serstakliga tá ið talan er um umfatandi útrokningar í stórum rokniørkum, kann verða trupult at varðveita gjøgnumskygni og harvið torført at meta um júst hvørjar fortreytir hesar útrokningar eru grundaðar á.

Tað er tískil greitt, at eins væl og búskaparligar útrokningar kunnu nýtast til at meta um framtíðarárin v.m., so kunnu hesar samstundis í stóran mun misnýtast.

Studningur er ikki ókeypis

Hóast vit nú hava sæð mong rokniørk, so hava ongi av hesum víst á hvørjar avleiðingar tað fær at varðveita ríkisstuðulin og at verða verandi í ríkisfelagsskapinum. Eins og aðrir búskaparfrøðingar hava víst á er veruleikin tann, at uttan mun til, um Føroyar verða verandi í danska ríkinum ella um Føroyar gerast sjálvstøðugt tjóð, so fær hetta búskaparlig árin, ið koma at kosta samfelagnum pening.

Valið stendur millum eitt framhaldandi studningssamfelag og eitt búskaparligt sjálvberandi samfelag.

Velja vit at halda áfram við at fáa ríkisstuðul er greitt, at hesin peningur framhaldandi fer at vera í føroyska samfelagnum. Hinvegin er somuleiðis greitt, at studningur ikki er ókeypis í longdini.

Prísurin fyri at halda áfram í núverandi støðu kenna vit alt ov væl. Her kunnu vit eitt nú hyggja at studningshefta føroyska vinnulívinum í 80'inum og 90'inum. Íløgur, nýtsla og framleisla, ið ikki er burðardygg og eftirfylgjandi vánaligt kappingarføri og kreppa eru bert nakrar av avleiðingunum, ið kunnu standast av, at ein vinna og eitt samfelag verður heft at studningi.

Tað kostar føroyska samfelagnum pening hvønn einasta dag valt verður at nýta studning til at reka eina ineffektiva skipan av samfelagnum. Hvat kemur tað so at kosta Føroyum at halda áfram við at verða eitt studningssamfelag ? Ikki er møguligt at seta upp rokniark og gera nágreinligar metingar um hetta. Søgan hevur tó víst okkum, hvat framtíðin kann koma at bjóða okkum.

Eisini fullveldi kostar

Hinvegin er eisini greitt, at skal føroyska samfelagið gerast sjálvberandi kemur tað m.a. at kosta ríkisstuðulin. Hetta fer í fyrsta umfari at týða minni inntøku hjá landskassanum og fer hetta at bera við sær týðandi og neyðugar tillagingar av føroyska samfelagnum.

Vegna studningin úr Danmark hevur Føroyar higartil haft ráð til at nýta skipanir og lógir, ið als ikki eru burðardyggar fyri føroyska samfelagið og ofta heldur ikki nøkta føroyska tørvin.

Tá ið studningurin fellur burtur verður neyðugt, at gera skipanir og lógir, ið verða snikkaðar til føroyska samfelagið og føroyska tørvin.

Hetta vil bera við sær eina tillagingartíð fyri samfelagið, men eins og føroyska vinnulívið í dag stendur sterkari enn nakrantíð, fer eisini føroyska samfelagið at standa sterkari aftaná eina føroyska tillaging, ið átti at verið farin fram fyri ártíggjum síðan.

Sum sjálvstøðug tjóð vilja Føroyar eisini fáa búskaparligt gagn av øktum altjóða samstarvi, samhandli, áræði v.m..

Ikki eitt búskaparligt val

Valið millum fullveldi og ríkisfelagskap er soleiðis ikki eitt búskaparligt val. Eins og við øllum øðrum valum her í lívinum eru fyrimunir og vansar - uttan mun til hvat valt verður.

Tað hevði verið frálíkt um vit kundu gjørt tvey rokniørk – eitt, ið lýsti samfelagsárin av at halda áfram við studningsbúskapinum og eitt, ið lýsti samfelagsárin av at gerast eitt samfelag við sjálvberandi búskapi – og síðan kundu tikið støðu út frá hesum. So einkul er veruleikin ikki.

Búskaparliga kemur tað at kosta óansað um valið fellur á fullveldi ella ríkisfelagsskap. Heldur enn til fánýtis at leita eftir vegleiðing í teimum mongu og mótsigandi rokniørkunum, má og skal valið tískil fyrst og fremst grundast á onnur virðir og á, hvørt føroyingar ynskja at gerast sjálvstøðug tjóð ella ikki.

gult19 cyan19 magenta19 svart19

Mánadagur 18. juni

svf

18.30 Likkulikkuleia 3 (e)
19.00 Vilhelm Tell 9:16
19.50 Ikki meira enn 30% - donsk matsending
20.20 Læknin hevur orðið
20.50 Kaldir føtur 11 – ensk kærleiksrød
21.40 Mannakroppurin 2:3 –nýggj dokumentarrød frá BBC
22.30 New York Blues – am. krimirød
23.20 Liðugt

EUROSPORT.com

07.30 Car Racing
09.00 Nascar
10.00 Tennis
11.00 Athletics
12.15 Cart
13.30 Table Tennis
14.30 Xtreme Sports
15.30 Car Racing
16.30 All Sports
17.00 Football
18.00 News
18.15 Water Polo - Live
19.00 All Sports
19.30 Motorcycling
21.00 Rally
22.00 News
22.15 Football
23.15 Cliff Diving
23.45 All Sports
00.15 News
00.30 Close

BBC PRIME

00.00 TLZ: »In the Footsteps of Alexander the Great – Lord of Asia«
01.00 TLZ: »Cracking the Code – Designer Children«
02.00 TLZ: »Dialogue in the Dark«
02.30 TLZ: »Film Montage: the Projection of Modernity«
03.00 TLZ: »Ships and Boats and Strain«
03.30 TLZ: »A Source of Inspiration«
04.00 TLZ: »Blood on the Carpet – Blood, Sweaters and Sears«
04.40 TLZ: »Megamaths - Fractions - Fifths and Tenths«
05.00 TLZ: »Japanese Language and People – Time Out«
05.30 TLZ: »English Zone«
06.00 Noddy: »Noddy and the Warm Scarf«
06.10 Angelmouse
06.15 Playdays
06.35 Blue Peter
07.00 Get your own Back
07.30 Ready, Steady, Cook
08.15 Style Challenge: »Alopecia«
08.40 Real Rooms
09.05 Bargain Hunt
09.30 Antiques Roadshow: »Selby«
10.00 Wildlife: »Pygmy Chimpanzee - the Last Great Ape«
10.30 TLZ: »In the Blood – Original Sin«
11.30 Gardeners' World
11.50 Ready, Steady, Cook
12.30 Style Challenge
13.00 Doctors: »The Waiting Game«
13.30 EastEnders
14.00 Real Rooms
14.30 Bargain Hunt
15.00 Noddy: »Noddy and the Warm Scarf«
15.10 Angelmouse
15.15 Playdays
15.35 Blue Peter
16.00 Get your own Back
16.30 Top of the Pops
17.00 Home Front
17.30 Doctors: »Be Thankful for What You've Got«
18.00 Classic EastEnders
18.30 Wildlife: »Crowned Lemurs - Blade Runners«
19.00 Hi-De-Hi
19.30 Next of Kin(Subtitled in Danish/Hebrew/Norwegian)
20.00 Vanity Fair
21.00 Ruby's American Pi
21.30 Top of the Pops 2
22.00 Waxworks of the Rich and Famous
23.00 The Lakes

BBC WORLD

00.00 BBC News
00.30 Correspondent (r)
01.00 BBC News
01.30 Aqua (r)
02.00 BBC News
02.30 Dateline London (r)
03.00 BBC News
03.30 Asia Today (r)
03.45 Reporters (r)
04.00 BBC News
04.30 Earth Report (r)
05.00 BBC News
05.30 Future Fantastic (r)
06.00 BBC News
06.30 Euro Brief
07.00 BBC News
07.30 HARDtalk
08.00 BBC News
08.30 Click Online (r)
09.00 BBC News
09.30 Correspondent (r)
10.00 BBC News
10.30 HARDtalk (r)
11.00 BBC News
11.30 Aqua (r)
12.00 BBC News
12.30 Correspondent (r)
13.00 BBC News
13.30 HARDtalk (r)
14.00 BBC News
14.15 World Business Report
14.30 Future Fantastic (r)
15.00 BBC News
15.30 Correspondent (r)
16.00 BBC News
16.30 Asia Today
17.00 BBC News
17.15 World Business Report
17.30 Click Online (r)
18.00 BBC News
18.30 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News
20.30 Holiday
21.00 BBC News
21.30 World Business Report
22.00 BBC News
22.30 Earth Report
23.00 BBC News
23.30 World Business Report (r)
23.45 Asia Today

3

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:05 TV-shop
08:05 Dummere end politiet tillader
08:25 Ricki Lake (G)
09:15 Ricki Lake
10:10 Horton-sagaen(G)
11:00 Horton-sagaen
11:50 Panter-tanter
12:20 Vild med dig
12:50 Melrose Place - classic
13:45 Interne Affærer
15:35 Baywatch
16:30 Ricki Lake
17:30 Sabrina - skolens heks
18:00 Susan - sød og single
18:30 Hvide Løgne
19:00 Det Perfekte Kup
20:00 Mandagsbio: Bulletproof
21:35 Falcone
22:35 Vore værste år
23:05 Simpsons
23:35 Ti tommelfingre
00:05 Monty Pythons flyvende cirkus
00:45 Kojak
01:45 Caroline, karrieren og kærligheden
02:15 Vore værste år(G)
02:45 Monty Pythons flyvende cirkus(G)
03:20 Sunset Beach
04:05 Godnat

ÚF

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur Kirsten Ellendersen í Fámjin lesur.
07.15 Morguntónleikur
07.30 Tíðindi
07.35 Góðan morgun Føroyar Dia Midjord og Jákup Magnussen leggja til rættis.
08.00 Tíðindi
08.03 Góðan morgun Føroyar
09.00 Tíðindi
09.03 Sunnudagsløtan (e) Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
09.33 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e) Kirsten Ellendersen í Fámjin lesur.
10.00 Tíðindi
10.05 Fimleikaløtan Beinta Danielsen og Elsa Maria Bærentsen stíla fyri.
10.10 Tit skriva, vit spæla Øssur Egholm leggur til rættis.
11.00 Tíðindi
11.03 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.50 Døgurðatónar
13.00 Ítróttatímin (e) Kristian Joensen og Ragnhild Ellingsgaard stíla fyri
13.45 Aktuelli gesturin (e)
14.00 Tey burturvístu (e) Útvarpsleikur eftir Dagny Joensen. Høgni Joensen leggur til rættis.
15.00 Tíðindi
15.03 Summar 2001 Helena Debes Højgaard, Beinta Løwe Jacobsen og Høgni í Jákupsstovu leggja til rættis.
16.00 Tíðindi
16.03 Summar 2001
17.00 Tíðindini
17.05 Hvat nú? Elis Poulsen leggur til rættis
18.00 Gjallarhornið (e) Kári Sverrisson leggur til rættis.
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Koparskrinið Dánjal Joensen lesur 6. part av framhaldssøgu eftir Jens Paula Heinesen.
19.30 Rák Tónleikasending, sum Kim Hansen leggur til rættis.
20.00 Summarjazzur Edward Nyholm Debes velur tónleikin.
21.00 Dagsetur Øssur Egholm leggur til rættis.
22.00 Tíðindi
22.00 Veðurtíðindi

Rás

09:45 Orðið Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10:00 Góðanmorgun-tónleikur
12:00 Tíðindi & lýsingar
12:15 Tónleikur
13:00 Leysløtan Innsløg, prát og tónleikur
14:00 Ynskløtan Heilsur frá lurtarunum
15:00 Tíðindi & lýsingar
15:15 Ynskløtan (framhald)
16:00 Birgir Beinleiðis (e) Birgir Sondum við gesti
17:00 Lættur tónleikur
18:00 Tíðindi & lýsingar
18:15 Lættur tónleikur
19:00 Orð á leiðini (e) EvR Sending Missión: "Mín lutur í missión?" Jógvan Zachariassen leggur til rættis Endursending frá hósdegnum.
19:40 Lættur tónleikur
21:00 Tíðindi & lýsingar
21:15 Orðið (e) Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Halleluja Andalig tónleikasending Heine Lútzen leggur til rættis
22:30 Náttartónleikur

Byrjan – Dagsskrá

13.00 Byrjan – Dagsskrá in verður lisin
13.15 Okkara dagliga breyð
14.00 Tónleikur
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Bønarlinjan frá Hósdegnum (e)
17.00 Bønartænastan byrjar. Tlf. 321377 og tilber at senda fax nr. 321378 Vit spæla lovsong tann næsta tíman
17.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
18.00 Bønartænastan. Biðið verður beinleiðis fyri bønarevninum.
19.00 Møti
20.00 Tónleikur fyri børn
20.30 Okkara dagliga breyð (e)
20.40 Tónleikur
21.00 Tónleikur fyri tilkomin v/ Steindor og Torbjørn
22.55 Dagslok Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
23.00 Vit gevast

Týsdagur 19. juni

svf

18.15 Tíðindi fyri deyv
18.30 Kristoffur Kolumbus 13:26 – italsk rød
19.00 Royn teg nú Shirley Holmes 37
19.30 Veingjasuð – um flytifuglar
20.00 Dagur Vika
20.20 Bumbumaðurin úr Oklahoma – dokumentar frá BBC
21.15 Ljósins hjarta – grønlendskur filmur
22.55 Kvinnur í fongsli 2:6 – ávstr. dokumentarrød
23.25 Liðugt

EUROSPORT.com

07.30 Table Tennis
08.30 Motorcycling
10.00 Rally
11.00 Football
12.00 All Sports
12.30 Athletics
13.30 Tennis - Live
15.00 Cliff Diving
15.30 Football
16.30 Rowing
17.30 Xtreme Sports
18.00 News
18.15 Water Polo - Live
19.00 Car Racing
20.00 Boxing - Live
22.00 News
22.15 Truck Sports
22.45 Motorcycling
00.15 News
00.30 Close

BBC PRIME

00.00 TLZ: »Secrets of World War II – Human Torpedoes«
01.00 TLZ: »Horizon – The Day the Earth Melted«
02.00 TLZ: »Clayoquot Sound - the Final Cut?«
02.30 TLZ: »Welfare for All?«
03.00 TLZ: »Cine Cinephiles«
03.30 TLZ: »The Argument from Design«
04.00 TLZ: »Blood on the Carpet – Walking with Disc Jockeys«
04.40 TLZ: »Megamaths - Fractions - Thirds and Sixths«
05.00 TLZ: »Japanese Language and People – Give and Take«
05.30 TLZ: »English Zone«
06.00 Noddy: »Noddy the Champion«
06.10 Angelmouse
06.15 Playdays
06.35 Trading Places: »French Exchange«
07.00 Belfry Witches
07.30 Celebrity Ready, Steady, Cook
08.15 Style Challenge
08.40 Real Rooms
09.05 Bargain Hunt
09.30 Antiques Roadshow: »Wisbech«
10.00 X Creatures: »Fathoming the Monster«
10.30 TLZ: »In the Blood – Divided We Stand«
11.15 Cathedral Calls
11.50 Celebrity Ready, Steady, Cook
12.30 Style Challenge: »Biscuit Factory Workers«
13.00 Doctors: »Be Thankful for What You've Got«
13.30 Classic EastEnders
14.00 Real Rooms: »Chelmsley Wood Kitchen«
14.30 Bargain Hunt
15.00 Noddy: »Noddy the Champion«
15.10 Angelmouse
15.15 Playdays
15.35 Trading Places: »French Exchange«
16.00 Belfry Witches
16.30 Top of the Pops Classic Cuts
17.00 Ainsley's Big Cook Out: »Mexico«
17.30 Doctors
18.00 Classic EastEnders
18.30 X Creatures: »Shooting the Bigfoot
19.00 Hi-De-Hi
19.30 Next of Kin
20.00 The Scold's Bridle
21.00 The League of Gentlemen: »Royston Vasey and the Monster from Hell«
21.30 Top of the Pops Classic Cuts
22.00 Biggest Wheel in the World
23.00 Casualty: »The Long Road Home«

BBC WORLD

00.00 BBC News
00.30 HARDtalk (r)
01.00 BBC News
01.30 Click Online (r)
02.00 BBC News
02.30 Correspondent (r)
03.00 BBC News
03.30 Asia Today (r)
03.45 World Business Report (r)
04.00 BBC News
04.30 HARDtalk (r)
05.00 BBC News
05.30 Holiday (r)
06.00 BBC News
06.30 Correspondent (r)
07.00 BBC News
07.30 HARDtalk
08.00 BBC News
08.30 Future Fantastic (r)
09.00 BBC News
09.30 Earth Report (r)
10.00 BBC News
10.30 HARDtalk (r)
11.00 BBC News
11.30 Click Online (r)
12.00 BBC News
12.30 Earth Report (r)
13.00 BBC News
13.30 HARDtalk (r)
14.00 BBC News
14.15 World Business Report
14.30 Holiday (r)
15.00 BBC News
15.30 Earth Report (r)
16.00 BBC News
16.30 Asia Today
17.00 BBC News
17.15 World Business Report
17.30 Future Fantastic (r)
18.00 BBC News
18.15 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News
20.30 Talking Movies
21.00 BBC News
21.30 World Business Report
22.00 BBC News
22.30 Reporters (r)
23.00 BBC News
23.30 World Business Report (r)
23.45 Asia Today

3

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:05 TV-shop
08:00 Hvide Løgne(G)
08:25 Ricki Lake(G)
09:15 Ricki Lake
10:10 Horton-sagaen(G)
11:00 Horton-sagaen
11:50 Panter-tanter
12:20 Vild med dig
12:50 Melrose Place - classic
13:45 Interne Affærer
14:45 Pæn pige - sej sild
15:10 Min kære familie
15:40 Baywatch
16:35 Ricki Lake
17:30 Sabrina - skolens heks
18:00 Susan - sød og single
18:30 Hvide Løgne
19:00 Skadestuen
20:00 Faktor 21 Film: Kevins kærester
21:40 Pernilles Univers
22:40 Vore værste år
23:10 Simpsons
23:40 Ti tommelfingre
00:10 Monty Pythons flyvende cirkus
00:50 Kojak
01:50 Ricki Lake (G)
02:45 Vore værste år (G)
03:15 Monty Pythons flyvende cirkus(G)
03:50 Sunset Beach
04:35 Godnat

ÚF

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur Kirsten Ellendersen í Fámjin lesur.
07.15 Morguntónleikur
07.30 Tíðindi
07.35 Góðan morgun Føroyar Dia Midjord og Jákup Magnussen leggja til rættis.
08.00 Tíðindi
08.03 Góðan morgun Føroyar
09.00 Tíðindi
09.03 Koparskrinið (e) Dánjal Joensen lesur 6. part av framhaldssøgu eftir Jens Paula Heinesen.
09.33 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e) Kirsten Ellendersen í Fámjin lesur.
10.00 Tíðindi
10.05 Fimleikaløtan Beinta Danielsen og Elsa Maria Bærentsen skipa fyri.
10.10 Tit skriva, vit spæla Øssur Egholm leggur til rættis.
11.00 Tíðindi
11.03 Á ferð um víddir (e) Robert McBirnie lesur ferðafrásagnir eftir Niels Juel Nolsøe. 7. partur.
11.30 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.50 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Summarjazzur (e) Edward Nyholm Debes velur tónleikin.
15.00 Tíðindi
15.03 Summar 2001 Helena Debes Højgaard, Beinta Løwe Jacobsen og Høgni í Jákupsstovu skipa fyri.
16.00 Tíðindi
16.03 Summar 2001
17.00 Tíðindini
17.05 Rasmus spælir plátur
18.00 Barnaútvarpið (e) Jonna Olsen og Kári Sólstein stíla fyri
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Heimurin í dag Arni Joensen leggur til rættis.
19.30 Poppservice Høgni Zachariassen velur løgini.
20.30 Sálmar og sangir Frelsens Hærtónleikur. Finngerð Djurhuus Olsen leggur til rættis.
21.00 Dagsetur Øssur Egholm leggur til rættis.
22.00 Tíðindi

Rás

09:45 Orðið Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10:00 Góðanmorgun-tónleikur
12:00 Tíðindi & lýsingar
12:15 Tónleikur
13:00 Leysløtan Innsløg, prát og tónleikur
14:00 Ynskløtan Heilsur frá lurtarunum
15:00 Tíðindi & lýsingar
15:15 Ynskløtan (framhald)
16:00 Lættur tónleikur
17:00 Laila Beinleiðis (e) Country, Laila Jacobsen leggur til rættis
18:00 Lýsingar & Tíðindi
18:15 Lættur tónleikur
19:30 Hálvtímin Andalig temasending. Heine Lútzen leggur til rættis.
20:00 Lættur tónleikur
21:00 Tíðindi & lýsingar
21:15 Orðið (e) Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Á torginum EvR Sending Samrøða við Olgu Kamiillo Wani frá Súdan Áki Andreasen leggur til rættis.
22:00 Tónleikur

Byrjan – Dagsskrá

13.00 Byrjan – Dagsskráin verður lisin
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Lívgandi orð við Tórður Poulsen
14.00 Brot og bitar (e)
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Leygarkvøld í Lindini um missión (e)
17.00 Bønartænastan byrjar. Tlf. 321377 og tilber at senda fax nr. 321378 Vit spæla lovsong tann næsta tíman
17.55 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
18.00 Bønartænastan. Biðið verður beinleiðis fyri bønarevninum.
19.00 Møti
20.00 Tónleikur fyri børn
20.30 Okkara dagliga breyð (e)
21.00 Spyr Harran fyrst: Sending har lurtari kunnu senda inn spurningar, sum so verða svaðir av einum paneli har umboð frá ymiskum samkomum eru við. Vertur er Jenis av Rana
22.55 Dagslok Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
23.00 Vit gevast